## FM í amboðsfimleiki fyri eldru fimleikararnar

Tað er Føroya Fimleikasamband, ið saman við Fimleikafelagnum Støkk av Glyvrum, sum skipar fyri kappingini. Hendan verður í Ítróttarhøllini í Runavík, verður byrjað leygardagin klokkan 13. Sunnudagin verða amboðsfinalurnar, har føroyameistarar verða funnir í hvørjum amboði fyri seg. Kappingin sunnudagin byrjar kl. 15.

Fimleikararnir fara báðar dagarnar at kappast á gólvinum og í lopi. Harafturat kappast kvinnuunglingarnir og kvinnurnar á bitanum, og mansunglingarnir og menninir kappast í ringunum.



## Holst skoraði ímóti FCK

Lyngby fekk í gjár vitjan av meistarunum úr FCK. Liðini dystaðust um pláss í finaluni í steypakappingini. Talan var allan dystin um Dávid ímóti Goliath, og tað var eisini stórfelagið úr Keypmannahavn, ið streyk avstað við sigrinum.

Eftir 50 minuttum hevði svenski Fredrik Berglund lagt FCK á odda 2-0. Síðan traðkaði heimaliðið veruliga til. Fyrst var tað Thomas Christiansen, ið eftir einum tíma pyntaði til 2-1. 20 minuttir seinni javnaði føroyski landsliðsleikarin, Christian Lamhauge Holst, til 2-2. Men gleðin vardi ikki leingi. Bert tveir minuttir seinni tryggjaði Hjalte Bo Nørregaard FCK sigurin, tá ið hann skoraði til endaliga úrslitið, 3-2. Returdystur verður komandi mikukvøld í Parkini.

# Dreymurin hjá Abramovich nærkast




*Við einum væl uppløgdum Didier Drogba á toppinum megnaði Chelsea at leggja stórt trýst á Liverpool fyri steðgin, og hetta var eisini nóg mikið til at vinna fyrru hálvfinaluna*
*Mynd: Polfoto/AP*

**Chelsea hevur enn møguleika at vinna fýra kappingar. Mikukvøldið vunnu teir tepran 1-0 sigur á Liverpool í fyrru hálvfinaluni í Champions League**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gingu nærum 77 minuttir, áðrenn Marko Merk gav fyrsta gula kortið í hálvfinaluni millum Chelsea og Liverpool. Men tað merkti á ongan hátt, at Javier Mascherano, sum fekk kortið, ella hinir á vøllinum spardu seg eitt tað einasta pettið í einum dysti, sum í 90 minuttir var júst so intensur, sum roknast kundi við, tá tvey ensk lið hittust í hesum partinum av kappingini.

### Heimatrýst

1-0 til heimaliðið var neyvan heldur eitt úrslit, sum tók veddararnar á bóli, og sum so var úrslitið eisini hampuliga rættvíst.

Einasta málið skeyt Joe Cole, tá 29 minuttir vóru farnir. Eftir skjótt Chelseaálop setti Drogba Daniel Agger av á brotsteigarmarkinum, og tá bólturin varð sendir flatt innfyri, megnaði Cole hegnisliga at stýra bóltinum í meskarnar.

Chelsea hevði hvørki leikbannað Essien ella skadda Ballack á liðnum. Ein veruleiki, sum uttan iva kundi skelkað flestu lið, men í stjørnusetta hópinum hevur José Mourinho eitt sindur av hvørjum at standa ímóti við. Hesa ferð við einum miðvølli við Makelele, Lampard, Obi Mikel og Cole. Og við Drogba og Shevchenko á toppinum var talan heilt greitt um eitt lið, sum megnar at leggja trýst á sjálvt tryggastu verjuna.

Og júst tað gjørdu teir eisini stóran part av fyrra hálvleiki. Liverpool hevði eisini bólti so passaliga nógv, men tað var alla tíðina heimaliðið, sum var tað vandamiklara. Reyna hevði eina framúr bjarging, tá Lampard hálvfluktaði, og tá Cole skoraði, var hetta heilt í tráð við spælbýtið.

### Gerrard nær við

Er tað nakað, sum hevur ovurstóran týdning í eini hálvfinalu í europiskari uppgerð, so er tað at halda nullið á heimavølli. Og tað var eisini hetta, sum tað nú snúi seg um hjá Chelsea.

Fyrru helvtina av seinna hálvleiki bar hetta tó við sær, at Liverpool til tíðir fekk dekan ov nógv spæl. Ikki minst, tí Makelele trekti seg heilt oman móti verjuni á defensiva miðvøllinum.

Gerrard, ið hevði útgangsstøði í høgru, reikaði alt meira, og ta einu ferðina mátti Cech nýta ytsta partin av neglunum, tá hann skumpaði eina skotroynd frá Liverpool-liðskiparanum út um stólpan.

Og nærri enn tí sama komu gestirnir ikki. Móti dystarenda hevði Chelsea enntá møguleika at økja, tá framúr væl spælandi Drogba legði bóltin fyri Lampard, men aftur hesa ferð vardi Reyna sera væl.

1-0 er ikki eitt úrslit, sum avger finalusessin undan dystinum í Liverpool. Men við at halda máli reint fekk Chelsea eitt framúr útgangsstøði. Fáa teir bara eitt mál á Anfield, noyðist Liverpool at skora tríggjar ferðir, og móti Cech og bláu verjufeløgum hansara verður hetta ein sera stór uppgáva.

## Bert finalur eftir

Chelsea venjarin Jose Mourinho var væl nøgdur um 1-0 sigurin, sum hann metir vera nóg tryggan til at vinna seg í finaluna.

Hinvegin plagar Mourinho eisini at vena seg um onkrar lutir, og soleiðis var eisini mikukvøldið.

- Vit høvdu fleiri møguleikar enn teir. Serliga í fyrra hálvleiki, og tí var 1-0 kanska í minna lagi. Í veruleikanum hava teir bara ein møguleika, og tá hevði Cech eina ótrúliga bjarging.

- Tað kann væl vera, at Benitez er nøgdur við at tapa 1-0, men vit eru eisini nøgdir um úrslitið. Vit meta í øllum førum, at hetta er nóg mikið, tó at alt er opið undan seinna dystinum, har Liverpool tó hevur ein fyrimun.

- Teir spæla móti Portsmouth um tríggjar dagar, og eg rokni við, at Benitez fer at spara onkrar spælarar í tí dystinum. Tað er eitt luksus, sum eg ikki havi ráð til. Hjá okkum er hvør dystur ein finala – eisini tann móti Bolton um vikuskiftið.

**-mørk**

## Benitez var vónbrotin

Rafael Benitez helt ikki, at hansara menn høvdu spælt upp til sítt besta mikukvøldið.

- Serliga fyri steðgin spældu vit ikki nóg væl. Vit mistu snøgt sagt bóltin alt ov lætt. Eftir steðgin vóru vit betri við, men vit vita, hvussu sterkir Chelsea eru í kontra-partinum, og tí máttu vit ansa eftir.

- Tað mugu vit eisini í seinnu hálvfinaluni. Tá skulu vit í øllum førum skora einaferð, og megna vit at vinna 2-0, eins og vit gjørdu í ligadystinum, so eru vit í finaluni.

**-mørk**